Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Býlingshúsið í Maritugøtu:

# 12 í røðini av nýggjum stovnum



*Inga Maria Amandusardóttir, stovnsleiðari, saman við børnum á stovninum*

**Fríggjadagin 22. oktober var almenn móttøka í Býlingshúsinum í Maritugøtu í Hoyvík, ið er tann 12 í røðini av nýggjum stovnum, ið eru settir á stovn í Tórshavnar kommunu**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Nógv fólk vóru møtt til móttøku, Jan Christiansen, borgarstjórið og Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini fluttu fram røður. Malan Thomsen sang fyri børninum.

Býlingshúsið í Maritugøtu er tann 12 í røðini av nýggjum stovnum, ið eru settir á stovn við tilsamans 580 plássum, í hesum valskeiðinum, og tríggir aðrir eru á veg.

Bara í hoyvíkshaganum eru tríggir stovnar latnir upp seinasta hálvtannað árið. Tann fjórði, sum verður bygdur omanfyri Mylnutjørn, letur upp um tvey ár.

Í Býlingshúsinum í Maritugøtu eru í dag tríggjar vøggustovur við 12 børnum í hvørjari stovu.



*Býlingshúsið í Maritugøtu er tann 12 í røðini av nýggjum stovnum, ið eru settir á stovn í Tórshavnar kommunu*



*Inga Maria Amandusardóttir, stovnsleiðari, við eini gávu sum stovnurin fekk frá Tórshavnar kommunu*



*Poula Eidesgaard og Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóri hjá býráðnum*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Fríða Brekku í Smiðjuni

**Fríggjadagin 5. november læt Fríða Brekku í Havn eina listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Á framsýningini eru 50 ymisk verk, vatnlitsmyndir, standmyndir og grafikkur**

Fríða Brekku er 35 ára gomul og úr Havn, hon er útbúgvin innan málarí og grafikk á seminarium fyri handverk & design í Nørresundby.

Saman við manninum, Jan Andersson, rekur hon grafiska verkstaðin á Listasavni Føroya.



*Fríggjadagin 5. november læt Fríða Brekku í Havn eina framsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík, myndaevnini eru fyri tað mesta veðrar og føroyska náttúran*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hon hevur áður sýnt fram saman við øðrum, men hetta er hennara fyrsta sjálvstøðuga franmsýning.

Myndaevnini eru fyri tað mesta veðrar og føroyska náttúran. Eisini eru standmyndir av hundum.

Framsýningin er opin til og við mikudagin 10. november, allar dagar frá kl. 14-18.

Hans Pauli Olsen, myndahøggari:

## Fær størsta legatprísin

**Fríggjadagin 12. november fær føroyski myndahøggarin Hans Pauli Olsen størsta legatprísin, sum verður givin myndahøggarum í Danmark, legatið hann fær er 400.000 kr**

Hans Pauli skal møta á Den Frie Udstillingsbygning, Oslo Plads, København Ø, fríggjadagin 12. november, har umleið 200 fólk eru boðin til hátíðarhaldið.

»Carl Nielsen og Anne Marie Carl-Nielsens Legat« verður latið trimum myndahøggarum, Ole Broager, Hans Paula Olsen og William Louis Sørensen.

Legatið er av teimum størstu kunstnaralegatum í danska kongaríkunum.

Samstundis sum legatið verður latið, hava teir tríggir listamenninir hvør sína framsýning á Den Frie Udstillingsbygning.

Hans Pauli sýnir fram fleiri standmyndir, har tann eina er 6 metrar høg.

Hann frumsýnir eisini standmyndina »Kavarin«, sum ímyndar ein kvinnu sum fer gjøgnum ein vegg, sum ímyndar sjógvin. Á aðrari síðuni á vegginum er standmyndin í náttúrligari støðd, og á hinari síðuni er hon dupult so stór. Stóru standmyndirnar eru gjørdar úr glartrevju og træ.



Framsýningin er opin frá leygardegnum 13. november til sunnudagin 5. desember 2004.

Hans Pauli Olsen, ið er 47 ára gamal, er ein av yngstu listarfólkum sum fáa hetta legat, sum bert verður givið fyri listarlig avrik gjøgnum longri tíð.

Anne Marie Carl-Nielsen var kona komponistin Carl Nielsen, tað er hon sum hevur gjørt høvdið á standmyndini av Rasmus Effersøe á Tinghúsvøllinum í Havn.

Hans Pauli Olsen sýndi fyrstu ferð fram sum 16 ára gamal á eini ólavsøkuframsýning. Hann sýndi fram høvdi á myndahøggaranum Janusi Kamban í gips.

Sum 19 ára gamal flutti Hans Pauli til Danmarkar, og sum 22 ára gamal kom hann inn á kunstakademiið í Keypmannahavn. Síðan 1987 hevur hann arbeitt sum listamaður burturav.

## Martin Thomsen 60 ára starvsdag



Tað má vera ein sjáldsom hending, at eitt fólk hevur 60 ára starvsdag á sama arbeiðsplássi. Men týsdagin hevur prentarin Martin Thomsen arbeitt í heili 60 ár á Prentsmiðju H.N. Jacobsens Bókahandli í Havn.

Tað var tann 9. november í 1944, at Martin fór í læru sum prentari. Hann lærdi í fimm ár og tók síðani sveinaprógv í Danmark. Tá arbeiddi hann eisini nakrar mánaðir niðri, men kom heimaftur til prentsmiðjuna mitt í Havnini at arbeiða og hevur arbeitt har síðani.

Seinastu 9 árini hevur Martin Thomsen verið einsamallur á prentsmiðjuni hjá Gamla Bókahandli, men tey, sum arbeiða í handlinum, hava bara gott at bera honum. Martin er altíð til tíðina, ja, tað ber til at seta klokkuna eftir honum, og hann er bæði fyrikomandi og hjálpsamur. Tá ið tey í handlinum hava brúk fyri eini hjálpandi hond at skera onkur pappír til, so leggur Martin alt til síðis og ger tað beinanveg – tað skal einki bíða eftir honum.

Martin er ættaður úr Gøtu, men hevur síðani lærutíðina búð í Havn. Hann er sonur Sámal Jákup við Gil, og mamman Birgitta var úr Barbustovu. Martin er giftur við Ragnu, sum er ættað úr Klaksvík. Tey eiga tríggjar døtur – Biritu, Petru og Hildigunn.

Týsdagin 9. november – á sjálvum 60 ára starvsdegnum – verður móttøka í Gamla Bókahandli fyri Martini Thomsen. Móttøkan verður frá klokkan 13.00.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum fyri ein og hvørja hjálp,
tit veittu okkum tá okkara høgt elskaði

**Jallgrím Poulsen**
Saltangará

lá sjúkur og doyði, tøkk til tykkum mongu, sum vóru
og vístu Jallgrím tað síðsta farvæl,
tøkk fyri vøkur orð í kapellinum og í kirkjuni.
Ein serlig tøkk til grannar, vinir, heimahjálp, sjúkrasystur
og Kára Rasmussen fyri at tit hjálptu við at gera tað
møguligt hjá Jallgrím at verða heima tað síðstu tíðina,
tøkk fyri tað umsorgan tit veittu okkum.

*Kærastu heilsanir*

**Jana, Eyðfinn og børnini**
**Daisy,**
**Esbjerg**

## Dagurin

**9. november. Teodor,** deyður umleið ár 300. Ungur rómverksur hermaður, sum var vorðin kristin. Hóast tær atsóknir, Diocletianus gjørdi at teimum kristnu, helt hann fast við trúnna. Hann setti eld á eitt skurðgudatempul í Róm og varð tikin av døgum. Grikst navn, ið merkir *Guðs gáva*.